

# Sethúsaognin Láarvegur 13, 100 Tórshavn er til sølu um hóskandi boð fæst

Húsini eru í 3 hæddum við lofti, miðhædd og kjallara.
Samlað búvídd er 330 m2.
Á loftinum eru køkur, stova og spísistova.
Í miðhæddini er durur, vaskirúm, hjallur, gongd, seymirúm, hjúnarúm við baðiverilsi, 2 kømur, baðiverilsi.
Í kjallaranum er gongd, køkur, stova, baðiverilsi, klædnarúm, 2 kømur.
Garaga og fiskarúm hoyra eisini til ognina.
Grundøkið er 451m2.
Húsini eru bygd í 1986.
Húsini hava sera gott útsýni og standa í friðarligum umhvørvi.
Myndir av ognini eru at síggja á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo

Áhugað kunnu venda sær til Jógvan Páll Lassen, adv., jpl@lawfirm.fo ella Tórunn D. Lassen, skrivara, tdl@lawfirm.fo

Sosialurin 341800

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4
100 TÓRSHAVN
TLF. 203040, FAX. 203041
E-MAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

# Vælnøgdir luttakarar

**Ferðavinnustevnan visitfaroeislands 2011 var hin størsta nakrantíð, og bæði føroyingar og útlendsku gestirnir vóru sera væl nøgdir við tiltakið.**

Leo Poulsen

Tað vóru einir 70 aktørar við á ferðavinnustevnuni visitfaroeislands 2011, og bæði føroyingar og útlendsku luttakararnir vóru stak væl nøgd.

Magni Arge, stjóri á Atlantsflog, sum saman við ferðavinnudeildini hjá uttanríkisráðnum skipaði fyri, var sera væl nøgdur og víst millum annað á, at tað fyri fyrstu ferð er eydnast at fáa amerikanarar at taka lut á ráðstevnuni.

- Hesaferð eru einar fýra amerikanskar ferðafyritøkur við, og tað gevur nakrar spennandi møguleikar. Eisini aðrar tjóðir eru við fyri fyrstu ferð, so alt í alt letur hetta upp fyri spennandi møguleikum, segði Magni Arge.

Hann vísti á, at ferðavinnan er ein vinna, sum tekur tíð at byggja upp.

- Hetta er ikki sum at kasta nót við einum nótaskipi, har eitt kast kann fylla skipið og geva manninginí meginpartin av einari ársinntøku. Tað tekur tíð at byggja eina ferðavinnu upp, og tað er úrslitið av einum miðvísum arbeiði, ið nú vísir seg, segði Magni Arge.

Eisini amerikanarar vóru væl nøgdir við tiltakið.

- Tit hava eina vakra náttúru at vísa á. Grøna grasið, seyðirnir og náttúran í síni heild kunnu heilt víst draga amerikanarar til sín, segði Marcia Seibert frá Simplicity Travel í Las Vegas.

## Eru á veg

Steen Ulrik Johannesen er blaðmaður og hevur stóra vitan um føroyska ferðavinnu. Hann vitjaði í Føroyum á fyrsta sinni í 1984, og hevur síðani 1997 starvast á ferðavinnuritinum »Take Off«.

Hann heldur, at føroysk ferðavinna hevur ment seg ein hóp síðani hann á fyrsta sinni var í Føroyum.

- Eg haldi, at tit enn einaferð eru á veg. Hendan ráðstevnan í ár er hin mest vitjaða nakrantíð, og nakrir nýggir og spennandi aktørar eru við fyri fyrstu ferð, segði Steen Ulrik Johannesen.

Hann heldur eisini, at føroyingar eru vorðnir betri at taka ímóti ferðafólkum.

- Trupulleikin hjá føroyingum plagdi at vera, at tit tóku ímóti ferðafólki sum gestum og dugdu ikki at taka tykkum goldnar fyri tænastur. Tað er vorðið nógv betri nú, segði Steen Ulrik Johannesen.

Eisini stóru hotellini síggja stórar møguleikar í nýggju luttakarunum.

- Tað kundi givið møguleikar fyri ráðstevnum og øðrum, og okkara hotell eru júst ráðstevnuhotell, sigur Jóhannes Jensen.

Eisini Oddbjørg Højgaard heldur, at nýggju londini tykjast spennandi.

Ráðstevnan varð hildin í Løkshøll fríggjadagin og leygardagurin varð nýttur til útferðir, áðrenn leiðin gekk av landinum aftur sunnudagin.

STARVSLÝSING



Eftirlitsfólk

Matvørudeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni leitar eftir einum eftirlitsfólki í tíðaravmarkað starv.
Sí www.hfs.fo

Freistin at lata umsókn inn er mikudagin 25. mai 2011.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

